# Ovmikið at gera

**Á Sandoy Seafood hava tey arbeitt hvønn dag síðan á nýggjárinum. Eisini onkran leygardag. Og líkt er til, at nokk er at gera nakað enn, sigur arbeiðsformaðurin á Sandi**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*



*Tey hava mest arbeitt upsa á Sandoy Seaffod. Mánadagin landaði Eysturbúgin eini 200.000 pund, sum hann hevði fingið í trý samdøgur*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Heima á Sandi:** – Ver ikki býttur, tað er ovmikið at gera, og vit hava arbeitt út í eitt síðan á nýggjárinum, letur Harry Hentze, arbeiðformaður hjá Sandoy Seafood Heima á Sandi, at.

Jú, tað er nokk at gera, og mánamorgunin kom Eysturbúgvin fullur undir lúkurnar at landa. Upsi. Eini 200.000 pund ella so, meta teir. Og makkarin, Vesturbúgvin, mann hava nakað tað sama í Vestmanna, verður mett. Teir hava bara roynt í eini trý samdøgur, vita teir at siga á bryggjuni Heima á Sandi.

Teir byrjaðu at landa um miðjan fyrrapartin, siga teir, og tað gongur hampiliga skjótt.

Tað stendur ein maður á bryggjuni við eini trakt, sum er fest í eina slisku uppi á skipinum. Hann heldur traktini inn yvir ein av mongu køssunum, sum standa á bryggjuni, og so hvørt sum upsarnir koma ígjøgnum, fara teir beinleiðis í kassan.

Tá fult er, flytir hann til næsta kassan, um ikki truckurin longu frammanundan hevur verið og skumpað tómu kassarnar nærri traktini, so maðurin sleppur undan at flyta seg.

### Betri slag

Tað gongur ein bláklæddur maður við skeggi á bryggjuni. Undir húgvu við áskriftini Sandoy Seafood. Tað er arbeiðsformaðurin, Harry Hentze.

Jú, hann er nøgdur við gongdina, sum er. Tá nokk er at gera til allar hendur, stendur bara væl til, heldur hann.

Eisini fegnast hann um, at slagið, teir fáa nú, er betri, enn tað hevur verið fyrr í ár.

Vesturbúgvin, sum liggur og landar eftir ein roktúr, hevur heldur størri upsa, enn hann hevur havt.

Teir flekja tann stóra fiskin, greiðir Harry frá, meðan tann smærri verður skorin til flak og frystur. Saltfiskurin verður arbeiddur Heima á Sandi, meðan tað frysta verður arbeitt í Skopun.

Fyrr varð selt nakað væl av feskum eisini, sigur formaðurin, men tað er mestsum dottið burtur nú.

### Nógvur útróður

Tann størri parturin hevur verið upsi, sum Sandoy Seafood hevur fingið frá skipunum, greiðir Harry Hentze frá.

Men eisini hevur væl av toski verið at fingið frá útróðrarbátunum, sum hava verið nógvir í oynni í vár.

Hann sigur, at fleiri fremmandir bátar hava hildið til á Sandi og í Skopun seinnu tíðina. Tað hava bæði verið bátar úr Havn og eisini nógvir suðringar, sum komu norðaneftir, haðani teir rýmdu, tí ov lítið var at fáa, og kanska eisini tí, at veðurlíkindini heldur ikki vóru tey bestu.

Tað hava verið dagar, har upp til 70 bátar hava avreitt í Skopun og umleið 50 á Sandi, sigur Harry Hentze.

Hann ivast ikki í, at tað eru friðingarnar, sum gjørdar vórðu vestanfyri, sum eru orsøkin til, at so væl hevur verið at fingið hjá snellubátunum í Vesturhavinum í vár.

Tað arbeiða reiðiliga 100 fólk á Sandoy Seafood, tá tað er upp á tað mesta. Eini 40 á Sandi og umleið 70 í Skopun, sigur Harry Hentze, arbeiðsformaður á Sandi.

# Teir gomlu eygleiðararnir

**Gomlu menninir á havnarlagnum tosa um, hvussu fiskiskapurin var í seinastu viku, og hvussu hendan man fara at roynast. Tað er sær sjálvum líkt Heima á Sandi sum alla aðrastaðni**

TÚNATOS
*Edvard Joensen*

Heima á Sandi: – Hvussu e' tað vorðið. Er Niels Jákup úti í dag? vilja teir vita. Hann hevur gjørt onkran góðan dag, vita teir, og eru spentir at frætta, um hann heldur fram við tí.

– Nei, tað er so vist, at hann er av oynni. Tað frætti eg úr Skopun í morgun, at hann fór umborð á Teistan.

– Hvat va' tað fyri eitt stort skip, sum var í havnini í nátt? Tað hevði tveir bummar úti.

– Tað var eitt, sum kom við tøðum til bøndurnar. Hann sjálvur, Pól á Klettum, stílaði fyri, veit ein.

Teir standa har í bólki í krókinum innanvert á havnarlagnum á Sandi. Sólin skínur, og tað er so toluliga lýtt, hóast kavi sást á fjøllunum norðanfyri fyrr í morgun. Flakavirkið er øðrumegin teir og egningarskúrarnir hinumegin. Ein bilur kemur oman brekkuna og sneiðir av. Ein, sum fer at hyggja sær eftir bátinum. Okkurt er at taka hondina í.

– Ja, hann er heldur ikki úti í dag. Man tað feila nakað hjá honum?

Nei, tað veit eingin reiðiliga at siga, og harvið verður tað. Um tað er tí, at teir eru so gamlir, at teir ikki orka at ganga út til hansara, er ikki til at vita, tí teir siga einki um tað sjálvir.

Líkjast ímyndini, ein hevur gjørt sær av gamla sandinginum, ein kendi fyrr. Í grønari ulpu er onkur, Einir tveir í »yviralls« blusu, og teir flestu í føroyskari húgvu. Undir liting, siga teir.

– Hoyr. Hvat veit Sosialurin at siga í dag? eru teir forvitnir at frætta.

– Nei, tað er mest politikkur, sum stendur í bløðunum nú, heldur blaðmaðurin og spyr, hvussu vorðið er við valstríðnum á Sandi.

– Nei, góðin. Eiðasørt. Sandingar eru rættiliga seinir soleiðis, heldur ein. Sæ' tú. Vit hava hoyrt um veljarakanningina, og vit trúgva upp á hana. Fólkafloksmaðurin fellur, og borgmeistarin í Skopun fer at verða valdur. Og tað halda vit so.

Javel. So er tann síðan greið, Teir gomlu her Úti í Støð tykjast hava tikið støðu.

Men hvussu er vorðið við hasum húsinum? vil fremmandamaðurin vita, og peikar yvir á húsini, sum standa næst havnarlagnum.

Hann heldur seg vita, at tey einaferð skuldu nýtast sum eitt slag av undirhúsi til hesar eldru meninar.

Har? Á Munkinum? Nei vælsignaður. Har kemur eingin. Teir royktu so óluksáliga illa har inni, at tað bar ikki til at vera har. Nú hava teir ansett folk har at smyrja hurðina, so hon ikki verður føst. Annars heldur bara havnarkontórið til har, og so er wc í kjallaranum. Tað er nokk opið, halda teir.

Navnið á Munkinum krevur eina frágreiðing, og hon er einføld, vita teir at siga.

Tað búðu einar fýra konur, sum ættaðar vóru úr Sumba, beint heimanfyri, so tað var so sjálvsagt, at ytstu húsini vórðu nevnd Munkurin.

So tosa teir um útvarpini, teir hoyra. Jú, tað er eitt bara heilt avvekslandi at hava fingið hasa nýggju kanalina afturat, halda teir. Rás 2 skilst.

– Tað er óbegrípiligt, hvat skopunarkonur eru raskar at senda hvørji aðrari heilsu, heldur ein. Hvussu munnu tær gera, tá tær hava tíð at lurta alla tíðina, meðan tær arbeiða á flakavirkinum?

– Tað er einki fyri, veit ein annar. Nú hava tey bara radio uppi á høvdinum. Líkjast rúmdarmonnum við antennum og tí heila. Og so lurta tær, meðan tær skera. Effektivar vælsignað.

Ja, tað kann so væl vera. Men tað visti tann triðji so fyri púra vist, at tá hann sjálvur, Elis, kom vit Klæmutti hjá Nielsi, tá útkonkurreraði hann heila lortið av øllum hinum.



*Munkurin stendur manntómur við undantaki av onkrum sum er ansettur at smyrja hurðina, so hon ikki verður føst, tí eingin brúkar hana, skemta teir Úti í Støð*

## Maersk Air leggur innanríkisrutur niður

**Tann 12. mai gevst Maersk Air at flúgva millum København og Billund og København og Rønne. Tá verður bara ein innanríkisruta hjá felagnum eftir. Hon er millum København og Aalborg**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Maersk Air boðaði í tíðindaskrivi mánadagin frá, at orsakað av ringum rakstrarúrsliti hevur leiðslan í felagnum gjørt av at gevast við tveimum av teimum trimum innanríkisrutunum, felagið røkir í Danmark.

Eftir verður so bara rutan millum København og Aalborg. Uttanríkisruturnar, teirra millum Føroyarutan, fara tó at halda fram sum higartil.

Flemming Ipsen, forstjóri í Maersk Air, sigur, at kappingin seinnu árini frá Stórabeltsbrúnni og teimum skjótu tokunum og ferjunum hava gjørt, at raksturin ikki ber seg longur. Tí hevur leiðslan gjørt av at leggja ruturnar niður, sigur hann í tíðindaskrivi mánadagin.

Maersk Air sigur í tíðindaskrivinum, at tað fer at fáa fylgur fyri starvsfólkið hjá felagnum á Bornholm, at rutan verður niðurløgd um mánaða. Starvsfólkini eru kunnað um støðuna.

Hinvegin verða ongar broytingar í starvsviðurskiftunum hjá starvfólkinum í Billund og København, verður sagt.

Ferðafólk, sum hava biðið um ferðaseðlar fram í tíðina, fáa sjálvandi ávíst aðrar ferðamøguleikar frá Maersk Air, stendur í tíðindaskrivinum.



# ILA við Kunoyarnes

**Alibrúkið hjá Faroe Salmon á Kunoyarnesi er nú eisini rakt av ILA. Hetta vísa kanningar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Bíðað verður nú eftir at fáa kanningarúrslitið staðfest av eini kanningarstovu í Aarhus, men alt bendir á, at alibrúkið er rakt av herviligu sjúkuni**

ILA
*Stefan í Skorini*



*Illgruni hevur verið um ILA í alibrúkinum í Kaldbaksfirði. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eyguni við brúkinum*

*Savnsmynd*

– Tað er nú sera sannlíkt, at ILA eisini er í alibrúkinum hjá Faroe Salmon, sum liggur við Kunoyarnes, sigur Peter Østergaard, djóralækni fiskasjúkudeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Kanningar hjá starvsstovuni vísa, at ILA royndirnar, sum eru tiknar í alibrúkinum, eru positivar.

Tó verður bíðað eftir kanningarúrslitunum av kanningarstovuni í Aarhus, sum skal staðfesta kanningarúrslitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Peter Østergaard sigur, at kanningarstovan í Aarhus hevur drúgvari royndir at gera slíkar kanningar, og tí skal úrslitið staðfestast í Danmark. Annars er tað sami kanningarháttur, sum verður nýttur her í Føroyum.

Royndirnar vórðu tiknar hósdagin í seinastu viku, eftir at fellið gjørdist størri enn vanligt. Markið er 0,5 promillu. Royndirnar vórðu sendar niður til kanningar fríggjadagin.

Faroe Salmon er fyrr rakt av ILA. Í november varð ILA staðfest í alibrúkinum í Hvannasundi, og tá varð fiskurin tikin.

Vit royndu at fáa fatur á stjórunum í Faroe Salmon, men tað eydnaðist ikki.

### Illgruni í Kaldbaksfirði

Illgruni hevur eisini verið um ILA í alibrúkinum í Kaldbaksfirði. Har vórðu tíggju royndir tiknar, og ein teirra var positiv. Hinar vístu einki tekin um ILA. Síðani vórðu tíggju nýggjar royndir tiknar, og hesar vóru allar negativar.

Peter Østergaard sigur, at tey fara at hava eyguni við alibrúkinum í Kaldbaksfirði, tí møguleiki er fyri, at ILA kortini eru í ringunum, hóast tíggju tær seinastu royndirnar ikki vístu tekin um sjúkuna.

# Advokatar á alnótini

**Advokat fyritøkan Faroe Law hevur fingið føroyska heimasíðu. Hetta boðar fyritøkan frá í tíðindaskrivi mánadagin. Á heimasíðuni finnast upplýsingar um virkisøki og starvsfólk hjá fyritøkuni, sum fæst við vinnulívsráðgeving burturav.**

MARKNAÐARFØRING
*Jóanes N. Dalsgaard*

Faroe Law er ein deild av donsku advokatfyritøkuni Dania Advokater A/S, sum hevur serkunnleika í at ráðgeva vinnufyritøkum, sum hava vinnuligt samstarv um landamørk. Føroyska deildin, sum varð stovnað á heysti 2000, fæst soleiðis við at ráðgeva útlendskum fyritøkum, sum virka í Føroyum eins og hon fæst við at ráðgeva føroyskum fyritøkum, sum virka uttan fyri Føroyar. Eitt nú hevur Faroe Law ráðgivið føroyskum virkjum, sum hava roynt seg í Ruslandi. Umframt Faroe Law, sum er deildin í Føroyum, hevur fyritøkan Dania Advokater A/S skrivstovur í Danmark, Grønlandi og Ruslandi. Íalt starvast smá 100 fólk hjá Dania Advokater, harav eru 2 fólk í føstum starvi hjá Faroe Law.

### Vinnulívsráðgeving burturav

Nú er ein advokatfyritøka ikki í sjálvum sær, nakað sjáldsamt. Tað serliga við Faroe Law í mun til onnur advokatvirkir í Føroyum er, at fyritøkan fæst við vinnulívsráðgeving burturav. Tað vanliga í Føroyum er annars, at eitt advokatvirki tekur sær av øllum løgfrøðiligum uppgávum alt frá sáttmálaspurningum til revsimál. Men tað ger Faroe Law ikki.

– Vit átaka okkum als ikki uppgávur viðvíkjandi revsirætti ella t.d. familjurætti. Vit halda okkum til vinnulívsráðgeving burturav, sigur Eyðfinnur Jacobsen stjóri á Faroe Law. Eyðfinnur Jacobsen er advokatur, og hann hevur sitið í stjórasessinum hjá Faroe Law síðani í summar. Eyðfinnur Jacobsen er serfrøðingur í føroyskari skattalóggávu. M.a. var hann eitt skifti leiðari á lógardeildini hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

– Tá tit nú bara taka tykkum av vinnulívsráðgeving, hava tit so betri førleika til vinnulívsráðgeving enn onnur advokatvirkir í Føroyum?

– Nei, tú fært meg ikki til at siga, at vit eru betri. Men vit eru avgjørt kappingarførir við aðrar advokatar í Føroyum, tá tað snýr seg um vinnulívsráðgeving.

– Eru tað kanska fleiri pengar í reinari vinnulívsráðgeving enn í tí breiða virkseminum, sum hini advokatvirkini reka?

– Tað kann vera nakað um tað. Vinnulívsráðgeving skapar ikki sama tørv á umsiting sum eitt nú innkrevjingarmál. Soleiðis spara vit kanska eitt sindur av pengum til skrivstovufólk. Men tað er ikki tað avgerandi. Tað avgerandi er, at vit fáast við vinnulívsráðgeving, tí tað er tað vit hava hug til. Fyri mítt egna viðkomandi kann eg siga, at eg havi ongan áhuga fyri eitt nú revsirætti. Hinvegin havi eg stóran áhuga fyri eitt nú skattarætti, og tí vil eg helst fáast við tað, sigur Eyðfinnur Jacobsen.

– Ein av orsøkunum til, at føroysk advokatvirkir átaka sær uppgávur av øllum handa slag, kundi kanska veri, at marknaðurin er so lítil. Er nakað grundarlag fyri einum advokatvirki, sum fæst við vinnulívsráðgeving burturav?

– Tað vita vit ikki heilt enn. Vit hava verið í gongd so stutt, so enn er ilt at siga nakað við vissu. Men royndirnar higartil benda á, at tørvur er á okkara tænastum, sigur Eyðfinnur Jacobsen, sum sjálvur annar starvast á skrivstovuni hjá Faroe Law við Tinghúsvegin í Havn.

Tey, sum vilja vita meira um Faroe Law í Føroyum kunnu vitja nýggju føroysku heimasíðuna hjá fyritøkuni á adressuni www.faroe-law.fo.





*Fyribils eru tveir løgfrøðingar í føstum starvi á deildini hjá Dania Advokater A/S í Føroyum. Eyðfinnur Jacobsen advokatur er stjóri á Faroe Law, sum føroyska deildin eitur, og Kári á Rógvi løgfrøðingur og LL.M. er advokatfulltrúi.*